## Borgvardt skrivaði undir í Íslandi

Í blaðnum í gjár skrivaðu vit, at B36 hevur verið í sambandi við tveir álopsspælarar, sum í fjør leiktu í bestu íslendsku deildini.

Nú er so greitt, at annar av hesum báðum í øllum førum ikki verður í Gundadali í ár, tí Allan Borgvardt og felag hansara, FH, samdust hósdagin um nýggjan sáttmála.

**- jm**



EB/Streymur hevur á heimasíðu sínari boðað frá, at teir til komandi kappingarárið hava fingið tilgongd av Sonna L. Petersen. Sonni hevur undan hesum alla tíðina leikt við NSÍ. Í fjør fekk hann heilt fitt av spælitíð frammi í álopinum, og í landskappingini gjørdist tað til seks mál frá fótum hansara.

**- jm**

## Todi framvegis ikki klárur

Todi Jónsson verður neyvan við frá byrjan, nú FCK fer undir fyrireikingarnar til seinnu hálvu av endaspælanum. Todi hevur í vetrarsteðginum verið í Eysturríki, har hann hevur fingið servenjing fyri skaðan í lærkrikanum, sum hevur arga í langa tíð. Heldur ikki Erik Mykland er førur fyri at venja við liðnum. Hann hevur fingið bruna í hælsinuna, og í ringasta føri kann hetta merkja, at hann noyðist at siga farvæl til fótbóltin med alla.

**- jm**



*Vinnur TB heimadystin á Mjølni, so kunnu tær longu nú seta seg væl til rættist í førarasetrið í kvinnukappingini*

# Brak í fyrsta umfarinum

**Longu fyrsta dystin í endaspælinum verður ein kanska av gerandi dystur leiktur, tá TB í Trongisvági tekur ímóti Mjølnir**

FLOGBÓLTUR
*Jákup Mørk*

Talan verður um stórdyst longu fyrsta umfarið, nú kvinnukappingin í flogbólti fer ígongd aftur. Eftir at KÍF fyrr í heyst misti kanadiska stórleikaran hjá sær, hevur alt bent á, at FM-kappingin verður ein kapprenning millum TB og Mjølnir, og nú sunnudagin hittast júst tey bæði liðini í fyrra innanhýsis dystinum í endaspælinum.

Og nógv bendir – tíverri – á, at gullstríðið í stóran mun kann vera avgjørt longu sunnudagin. Tí hóast liðini í løtuni eru jøvn í stigum, so eru tær úr TB fýra sett betri, og tann munurin kann vísa seg at gerast avgeradni. Ikki minst um TB vinnur dystin sunnudagin, tí so kunnu tær í veruleikanum savna kreftirnar um ikki at tveita nøkur býtt sett burtur restina av kappingini, og eydnast hetta, so eru tær meistarar. Líka mikið hvussu leikur fer í Klaksvík í seinna innanhýsis dystinum.

### Dráttur vil upp

Tveir aðrir dystir eru hjá kvinnunum hetta umfarið. Á Giljanesi er einki at ivast í, at Dráttur er favorittur, tá KÍF kemur á vitjan. Dráttur megnaði seinasta vikuskifti at vinna Mjølnir kappingina, og tó at tær neyvan fara at leggja seg út í sjálvt gullstríðið, so er einki at ivast í, at tær ætla sær uppeftir á talvuni, og her vil ein sigur lyfta tær eitt pláss upp alt fyri eitt. KÍF er sum nevnt heldur ikki tað, sum tær vóru við kappingarársbyrjan, og tí er einki at ivast í, at tey í Vágunum rokna fyri vist, at stigini ikki fara nakran veg.

Tað rokna tey Kambsdali neyvan heldur við, tá Fleyr kemur á vitjan. Sæð burtur frá heimadystinum móti Drátti tíðliga á kappingarárinum, so hevur Fleyr bara tapt, og tó at framstigini vóru sjónlig móti endanum av grundspælinum, so eigur ikki at roknast við, at tær fara at gera nakað við ÍF.

### Greiðir favorittar

Hjá monnunum verða tveir dystir leiktir um vikuskiftið, og felags fyri báðar er, at favoritt-leiklutirnir eru so greiðir, sum teir kunnu vera. Tey bæði havnarfeløgini, Fram og Fleyr, hava ongar sum helst ætlanir um at spæla við í toppinum í ár, og á útivølli móti ávíkavist SÍ og ÍF man vera lítið hjá teimum at gera. Sjálvandi kann sensatiónin ongan tíð útilokast, men tað vildi so verið ein av teimum heilt stóru, um tað óvæntaða skuldi hent.

**Hondbóltsstøður**

1. Deild kvinnur

| | dystir | v - j - t | vunnin mál | tapt mál | mál-munur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 Stjørnan | 1 | 1 -0 -0 | 329 | 249 | 80 | 13 |
| 2 VB | 1 | 1 -0 -0 | 335 | 261 | 74 | 10 |
| 3 Neistin | 1 | 1 -0 -0 | 340 | 289 | 51 | 10 |
| 4 VÍF | 1 | 0 -0 -1 | 329 | 281 | 48 | 9 |
| 5 StÍF | 1 | 0 -0 -1 | 296 | 343 | -47 | 5 |
| 6 Søljan | 1 | 0 -0 -1 | 238 | 319 | -81 | 2 |
| 7 Kyndil | 0 | 0 -0 -0 | 192 | 317 | -125 | 1 |

**Flogbóltsstøður**

Meistaradeild, kvinnur

| | | d | v - t | v sett | t sett | +/- sett | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | TB | 0 | 0 - 0 | 27 | 7 | 20 | 8 |
| 2 | Mjølnir | 0 | 0 - 0 | 25 | 9 | 16 | 8 |
| 3 | KÍF | 0 | 0 - 0 | 17 | 22 | -5 | 5 |
| 4 | Dráttur | 0 | 0 - 0 | 17 | 18 | -1 | 4 |
| 5 | ÍF | 0 | 0 - 0 | 13 | 19 | -6 | 4 |
| 6 | Fleyr | 0 | 0 - 0 | 7 | 29 | -22 | 1 |

Meistaradeild, menn

| | | d | v - t | v sett | t sett | +/- sett | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | Mjølnir | 8 | 7 - 1 | 21 | 4 | 17 | 21 |
| 2 | ÍF | 8 | 7 - 1 | 21 | 5 | 16 | 21 |
| 3 | SÍ | 8 | 4 - 4 | 14 | 14 | 0 | 12 |
| 4 | Fram | 8 | 2 - 6 | 8 | 19 | -11 | 6 |
| 5 | Fleyr | 8 | 0 - 8 | 2 | 24 | -22 | 0 |



# Politikarar rópa í gongugøtuni

**Fyrrapartin í dag, klokkan 11, verður skipað fyri einum øðrvísi valfundi í gongugøtuni í Havn, sum verður skipaður eftir »speaker's corner« leistinum, har hvørt valevni stendur á einum kassa og rópar sín boðskap út. Tiltakið er til frama fyri ÍSB**

VALFUNDUR
*Tíðindafundur*

Meðan lýst verður dúgliga við valfundum kring alt landið, eru so at siga eingir slíkir fundir í høvuðsstaðnum, hóast Suðurstreymoyar valdømi er tað størsta í landinum við flest veljarum, flest valevnum og flestu valdømisvaldu politikarum.

Tí eru nú stig tikin til ein øðrvísi valfund í gongugøtuni í Havn, sum verður í dag klokkan 11.

Har kunnu so fólk eisini fáa sær ein kaffimunn og okkurt søtt, samstundis sum tey fáa møguleika at lata eitt oyra til ÍSB, Ítróttarsambandið fyri brekað. So hóast fólk kunnu vera troytt av politikarunum, kunnu tey møta upp og vera við til at stuðla einum góðum endamáli.

### Hvør sína megafon

Fundurin verður skipaður eftir »speaker's corner« leistinum, so hvørt valevni fer at standa á sínum kassa og rópa sín boðskap út. Valevnini fáa nevniliga eina megafon í part, so tey kunnu vera vís í at verða hoyrd.



Fyrst fáa valevnini eitt innlegg upp á ein minutt, og síðani verða tvey umfør til viðmerkingar og aftursvar, áðrenn fundurin endar við einum umfari í part à 15 sekund.

Umframt valevnini, verður eisini livandi tónleikur at hoyra.

Sjey politikarar hava játtað at verið við á fundinum: Óli Breckmann, Heðin Mortensen, Katrin Dahl Jacobsen, Malan Johansen, Annita á Fríðriksmørk, Tummas Juul Askham og Johan í Kollafirði.

Veðurmenninir lova lítlan vind, turrveður og sólglottar fyrrapartin í dag, so fyrireikararnir vóna, at mong nýta høvið til at uppliva politikararnar á ein eitt sindur øðrvísi hátt enn vanligt.




Hendrik Old

Valevni Javnaðarfloksins í Suðuroy



- **Vágshavn:** Góðtaki ikki at 5 mio. verða tiknar frá havnaútbyggingini í Vági. **Givin lyftir skulu haldast!**
- **Lækka avgjøld:** So at útlendsk skip aftur koma á Vág at leggja upp.
- **Flutningsstuðulin:** Skal hækkast aftur so virkini í Suðuroynni fáa somu kappingarmøguleikar sum onnur virkir
- **Smábátar fiska frítt**
- **Tunnilin millum Hov og Øravík**
- **Mjólkaprísurin skal niður aftur**



nakað fyri C

Javnaðarflokkurin

www.javnadarflokkurin.fo